EB/Streymur-KÍ 4-2 (2-0)

# KÍ aftur sett upp á pláss



*Kurt Mørkøre fekk tvey mál á Mølini, men hetta var tó ikki nóg mikið at tryggja klaksívkingum stig*

*Mynd: SJ*

**Í málsókna EB/Streymi hava teir framvegis góðan hug at spæla fótbólt, meðan tað tykist tyngri hjá klaksvíkingum**

Klaksvíkingar hava ikki havt nakað serligt kappingarár. Stóra vónbrotið var, tá teir á norðoyarstevnu taptu so dyggiliga ímóti EB/Streymi.

Sunnudagin høvdu teir møguleikan at gera tað gott aftur, men aftur hesa ferð var tað nýggjasta liðið í bestu deildini, sum fór við øllum. Og aftur hesa ferð eydnaðist tað EB/Streymi at skora fýra mál ímóti klaksvíkingum.

## Munur í hugi

Nógvir av spælarunum hjá KÍ hava roynt eitt sindur av hvørjum. Hjá teimum í EB/Streymi er hetta kappingarárið tað fyrsta í bestu deildini. Tað er einki at ivast í, at m. a. orsaka av hesum veruleikanum, er hugurin og motivatiónin hjá teimum í EB/Streymi størri, enn hann er hjá KÍ spælarunum, nú kappingin fer at halla. Klaksvíkingarnir hava líka sum innstillað seg uppá, at teir fara ikki at røkka nøkrum í landskappingini. Teir í EB/Streymi spæla við stórum spenningi um, hvussu høgt teir fara at megna at røkka á støðutalvuni.

Tað var ongantíð heilt stórur munur í spælinum á Mølini. Heimaliðið kom framum, tá ein av verjumonnunum hjá Kí var óheppin. Í roynd at temja, misti hann bóltin til Sorin Anghel, sum var ein støðug hóttan. Fremmandi maðurin takkaði fyri og smekkaði bóltin í málið.

KÍ varð ikki tikið av fótum av hesum. Teir spældu seg til málmøguleikar, og tað var um reppið, at teir javnaðu. Men Harley Bertholdsen var óheppin, tí royndin hjá honum úr góðari støðu tók tvørtræið og støkk niður í vøllin.

Í staðin megnaði heimaliðið stutt undan steðginum at økja til 2–0. Ronnie Samuelsen, sum var góður stýrimaður á miðvøllinum, átti síðsta fótin á, eftir uppspæl í høgru, har Knút Vesturtún alla tíðina hevði tyngd í gjøgnumbrotunum.

## Spenti bogin brast

At KÍ var aftanfyri hevði við sær, at teir kendu seg noyddar at umskipa. Tomislav Sivic setti beinanvegin eftir steðgin seg sjálvan inn á framrættaða miðvallarplássið, og so varð ein maður tikin út úr verjuni.

At framrættaði parturin varð styrktur, og at verjuparturin hjá KÍ var gjørdur meiri opin, hevði við sær, at spentar støður stóðust í báðum endum. Gunnar á Steig hevði onkra góða bjarging, og eina ferð bjargaði liðfelagi fyri hann á mállinjuni. Og í hinum endanum vardi Meinhardt Joensen fyri, tá mótstøðumenn tvær ella tríggjar ferðir komu púra einsamallir ímóti honum, tí rangstøðufellan var kiksað frammarlaga á vøllinum.

Hesa løtuna tóktist tað sum um møguleikin var fyri, at KÍ skuldi koma upp í part aftur, um teir skoraðu fyrst. Men tað var heimaliðið, sum skoraði og harvið staðfesti leiðsluna. Sorin Anghel, sum var komin púra leysur, sendi í beinini á málverjanum, og vandin í KÍ brotsteiginum tóktist at vera av, tá Ronnie Samuelsen sera hegnisliga úr vinstru potaði upp í handara síðunetið.

Fleiri ferðir í 2. hálvleiki endaði KÍ uppspæl við innleggum frá Harley Bertholdsen í høgru. Kurt Mørkøre var ein støðug hóttan, men hann hevði ikki altíð marginalirnar við sær. Kortini stútaði hann til 3–1. Um eitt vet av spenningi tá kom í aftur, so punkteraði dysturin orduliga, tá Jón Sigurð Gleðisheygg fimm minuttir undan leikloki økti. Hann var mitt fyri málinum og ein metur frá, tá hann stýrdi innleggi av baklinjuni í høgru frá Soran Anghel í málið. Og so var bara talan um pynt, tá Kurt Mørkøre skoraði síðsta málið.

### Dysturin í tølum:

**EB/Streymur-KÍ 4-2 (2-0)**
1-0: Sorin Anghel 18
2-0: Ronnie Samuelsen 45
3-0: Ronnie Samuelsen 63
3-1: Kurt Mørkøre 73
4-1: Jón Sigurð Gleðisheygg 81
4-2: Kurt Mørkøre 90
**Dómari:** Petur Skarðenni (LÍF)

**EB/Streymur:** Gunnar á Steig – Andrzej Pacek, Ólavur Poulsen, Alfred Jacobsen – Knút Vesturtún, Jákup Martin Joensen, Ronnie Samuelsen, Eyðfinnur Joensen, Christian Carlsson – Jón Sigurð Gleðisheygg, Sorin Anghel
**KÍ:** Meinhardt Joensen – Andrass Jacobsen, Símun Waag Høgnesen, Atli Danielsen – Harley Bertholdsen, Jan Joensen, Ove Nysted, Fríðin Ziskason, Hjalgrím Elttør – Alexander Djordjevic, Kurt Mørkøre

LÍF-KÍ 2-0 (1-0):

# Dysturin feyk burtur

**Lítið skil var í fótbóltsspælinum, tá botnliðini í 2. deild spældu avgerandi dyst á hálum vølli í nógvum vindi og regni**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Líkindini vóru sera stak vánalig, tá LÍF og KÍ spældu í Leirvík leygardagin. Hetta ávirkaði dystin nógv, og tað var lítið fótbóltsspæl at síggja.

Bæði liðini royndu at flyta bóltin á liðnum, men umstøðurnar vóru heilt einfalt ikki til tað. Hetta ávirkaði ikki minst vitjandi liðið, sum hevði nógvar kvikar bóltspælarar á liðnum. Heimaliðið dugdi betri at spæla í ringa veðrinum og hála vøllinum, og teir vunnu eisini uppiborið dystin.

LÍF hevði vindin undan fyrstu trý korterini, og tað gjørdi, at nógv av spælinum gekk fyri seg á KÍ-hálvuni. KÍ kláraði tó at skapa vanda í skjótum mótálopum, og meira enn einaferð vóru teir um at sleppa avgerandi ígjøgnum verjuna hjá leirvíkingum.

LÍF legði nógvar inn í brotsteigin hjá KÍ í fyrra hálvleiki, men tað var sjáldan at veruligur vandi stóðst av hesum. KÍ-verjan kláraði fyri tað mesta at rudda burtur, hóast onkrar støður endaði við hornaspørkum.

Stutta løtu fyri hálvleikssteðgin eydnaðist heimaliðnum at koma fram um. Hetta hendi eftir álop í høgru síðu, bólturin endaði úti í vinstru, og tá hann varð sendur inn fyri málið aftur, stútaði ein púra leysur Bárður Heinason bóltin í málið.

## Tveir útvístir

Í seinna hálvleiki hevði KÍ undanvind, men hetta hevði ikki við sær tað stóra trýstið á LÍF-málið, sum roknast kundi við. KÍ-liðið kláraði ikki at seta seg avgerandi á miðvøllin og trýsta spælið fram, og tí var LÍF væl við í seinna hálvleiki.

KÍ kláraði ikki at spæla seg til stórar kjansir, og tað tóktist sum tað var eingin friður á spælinum hjá gestunum. Teir høvdu ov stóran skund, og tað endaði við skotum langt úti frá og nógvum høpisleysum sendingum. Vánaliga veðrið var eisini ein meinbogi fyri nøkrum skilagóðum spæli.

LÍF økti til 2-0, tá Erik Lervig sendi eitt fríspark inn fyri málið. Um ætlanin var at senda beinleiðis í málið var ivasamt, men bólturin sigldi omanfyri málverjan og í handara síðunet.

KÍ royndi at koma afturíaftur, men framvegis kláraði liðið ikki at skapa kjansir.

Móti endanum av dystinum fingu tveir KÍ-spælarar reyð kort. Fyrst Erling Fles og síðani innskifti Rúni Elttør vóru sendir av vøllinum áðrenn tíð.

Dysturin hevði við sær, at LÍF slapp sær fram um KÍ, og nú eru tað klaksvíkingar sum liggja á næstaftasta plássinum í deildini.

### LÍF-KÍ 2-0 (1-0)

1-0: Bárður Heinason
2-0: Erik Lervig



### Støðan, danska superligan

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Brøndby | 7 | 6 - 0 - 1 | 24 | 3 | 21 | 18 |
| 2 | AaB | 7 | 5 - 0 - 2 | 13 | 9 | 4 | 15 |
| 3 | FCK | 7 | 3 - 2 - 2 | 10 | 7 | 3 | 11 |
| 4 | AB | 7 | 3 - 2 - 2 | 10 | 7 | 3 | 11 |
| 5 | Lyngby | 7 | 2 - 4 - 1 | 8 | 7 | 1 | 10 |
| 6 | Viborg | 7 | 2 - 3 - 2 | 9 | 8 | 1 | 9 |
| 7 | FCM | 7 | 2 - 3 - 2 | 5 | 5 | 0 | 9 |
| 8 | Vejle | 6 | 2 - 2 - 2 | 10 | 11 | -1 | 8 |
| 9 | OB | 6 | 2 - 1 - 3 | 5 | 8 | -3 | 7 |
| 10 | Esbjerg | 6 | 2 - 1 - 3 | 6 | 13 | -7 | 7 |
| 11 | AGF | 6 | 0 - 2 - 4 | 1 | 10 | -9 | 2 |
| 12 | Silkeborg | 7 | 0 - 2 - 5 | 2 | 15 | -13 | 2 |

### Støðan, danska 1. deild

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Køge | 6 | 5 - 1 - 0 | 10 | 3 | 7 | 16 |
| 2 | Frem | 6 | 4 - 2 - 0 | 14 | 6 | 8 | 14 |
| 3 | Farum | 6 | 4 - 1 - 1 | 18 | 10 | 8 | 13 |
| 4 | HFK Sønderj. | 6 | 3 - 2 - 1 | 13 | 9 | 4 | 11 |
| 5 | Randers F. | 6 | 3 - 1 - 2 | 9 | 8 | 1 | 10 |
| 6 | Herfølge | 5 | 2 - 3 - 0 | 7 | 4 | 3 | 9 |
| 7 | B93 | 6 | 2 - 1 - 3 | 14 | 12 | 2 | 7 |
| 8 | AC Horsens | 5 | 2 - 1 - 2 | 4 | 3 | 1 | 7 |
| 9 | FC Aarhus | 6 | 1 - 4 - 1 | 10 | 10 | 0 | 7 |
| 10 | B 1913 | 6 | 2 - 1 - 3 | 9 | 9 | 0 | 7 |
| 11 | Brønshøj | 6 | 2 - 1 - 3 | 10 | 14 | -4 | 7 |
| 12 | Hvidovre | 6 | 1 - 3 - 2 | 7 | 8 | -1 | 6 |
| 13 | Skive | 6 | 1 - 3 - 2 | 9 | 11 | -2 | 6 |
| 14 | B 1909 | 6 | 1 - 1 - 4 | 6 | 16 | -10 | 4 |
| 15 | Fredericia | 6 | 0 - 2 - 4 | 7 | 13 | -6 | 2 |
| 16 | Kolding IF | 6 | 0 - 1 - 5 | 7 | 18 | -11 | 1 |

### Støðan, norska tippeligan

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Rosenborg | 21 | 14- 5 - 2 | 61 | 25 | 36 | 47 |
| 2 | Viking | 21 | 13- 5 - 3 | 39 | 21 | 18 | 44 |
| 3 | Lillestrøm | 20 | 13- 4 - 3 | 49 | 26 | 23 | 43 |
| 4 | Brann | 21 | 11- 5 - 5 | 56 | 34 | 22 | 38 |
| 5 | Molde | 21 | 11- 4 - 6 | 49 | 35 | 14 | 37 |
| 6 | Stabæk | 21 | 11- 2 - 8 | 39 | 35 | 4 | 35 |
| 7 | Odd. Grenl. | 20 | 9 - 4 - 7 | 37 | 32 | 5 | 31 |
| 8 | Moss | 21 | 8 - 2 -11 | 30 | 38 | -8 | 26 |
| 9 | Lyn | 21 | 5 - 7 - 9 | 35 | 39 | -4 | 22 |
| 10 | Sogndal | 21 | 6 - 4 -11 | 33 | 50 | -17 | 22 |
| 11 | Bodø/Glimt | 21 | 4 - 8 - 9 | 31 | 39 | -8 | 20 |
| 12 | Strømgodset | 21 | 3 - 7 -11 | 34 | 62 | -28 | 16 |
| 13 | Tromsø | 21 | 4 - 2 -15 | 18 | 43 | -25 | 14 |
| 14 | Bryne | 21 | 3 - 3 -15 | 22 | 54 | -32 | 12 |

### Støðan, hollendska toto-deildin

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FC Zwolle | 4 | 4 - 0 - 0 | 9 | 3 | 6 | 12 |
| 2 | BV Veendam | 4 | 3 - 1 - 0 | 10 | 5 | 5 | 10 |
| 3 | Cambuur /L. | 4 | 2 - 2 - 0 | 4 | 1 | 3 | 8 |
| 4 | ADO Den Haag | 3 | 2 - 1 - 0 | 6 | 1 | 5 | 7 |
| 5 | RBC Roos'daal | 4 | 2 - 1 - 1 | 7 | 4 | 3 | 7 |
| 6 | Storm/Telstar | 4 | 2 - 0 - 2 | 8 | 5 | 3 | 6 |
| 7 | Excelsoir | 2 | 2 - 0 - 0 | 5 | 2 | 3 | 6 |
| 8 | Haarlem | 3 | 1 - 1 - 1 | 5 | 4 | 1 | 4 |
| 9 | Volendam | 4 | 1 - 1 - 2 | 4 | 6 | -2 | 4 |
| 10 | Top/Oss | 4 | 1 - 1 - 2 | 4 | 8 | -4 | 4 |
| 11 | Heracles A. | 3 | 1 - 0 - 2 | 4 | 3 | 1 | 3 |
| 12 | Emmen | 2 | 1 - 0 - 1 | 4 | 3 | 1 | 3 |
| 13 | Dordrecht '90 | 4 | 1 - 0 - 3 | 6 | 9 | -3 | 3 |
| 14 | VVV | 4 | 1 - 0 - 3 | 6 | 9 | -3 | 3 |
| 15 | G.A. Eagles | 3 | 0 - 2 - 1 | 4 | 8 | -4 | 2 |
| 16 | Eindhoven | 3 | 0 - 2 - 1 | 3 | 7 | -4 | 2 |
| 17 | MVV | 3 | 0 - 1 - 2 | 4 | 8 | -4 | 1 |
| 18 | Helmond Sp. | 4 | 0 - 1 - 3 | 1 | 8 | -7 | 1 |

Perioduvinnarnari eru merktir »+«

### Støðan, enska 3. deild

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Rochdale | 6 | 5 - 1 - 0 | 11 | 4 | 7 | 16 |
| 2 | Shrewsbury | 6 | 4 - 1 - 1 | 8 | 6 | 2 | 13 |
| 3 | Mansfield | 6 | 3 - 3 - 0 | 11 | 5 | 6 | 12 |
| 4 | Hull | 5 | 3 - 2 - 0 | 9 | 2 | 7 | 11 |
| 5 | Luton | 6 | 3 - 2 - 1 | 11 | 7 | 4 | 11 |
| 6 | Leyton O. | 6 | 3 - 2 - 1 | 9 | 5 | 4 | 11 |
| 7 | Darlington | 6 | 3 - 2 - 1 | 8 | 5 | 3 | 11 |
| 8 | Southend | 6 | 3 - 1 - 2 | 7 | 5 | 2 | 10 |
| 9 | Bristol R. | 6 | 3 - 1 - 2 | 7 | 7 | 0 | 10 |
| 10 | York | 6 | 3 - 0 - 3 | 8 | 9 | -1 | 9 |
| 11 | Swansea | 5 | 2 - 2 - 1 | 9 | 8 | 1 | 8 |
| 12 | Oxford Utd. | 6 | 2 - 2 - 2 | 7 | 6 | 1 | 8 |
| 13 | Scunthorpe | 6 | 2 - 1 - 3 | 10 | 8 | 2 | 7 |
| 14 | Plymouth | 5 | 2 - 1 - 2 | 5 | 5 | 0 | 7 |
| 15 | Kidderm. | 6 | 2 - 1 - 3 | 4 | 7 | -3 | 7 |
| 16 | Lincoln C. | 6 | 1 - 3 - 2 | 7 | 6 | 1 | 6 |
| 17 | Macclesfield | 6 | 1 - 3 - 2 | 6 | 11 | -5 | 6 |
| 18 | R&D | 6 | 1 - 2 - 3 | 5 | 7 | -2 | 5 |
| 19 | Halifax | 6 | 1 - 2 - 3 | 4 | 9 | -5 | 5 |
| 20 | Hartlepool | 5 | 1 - 1 - 3 | 5 | 7 | -2 | 4 |
| 21 | Torquay | 6 | 1 - 1 - 4 | 4 | 9 | -5 | 4 |
| 22 | Cheltenham | 6 | 0 - 3 - 3 | 9 | 12 | -3 | 3 |
| 23 | Carlisle | 6 | 0 - 3 - 3 | 4 | 8 | -4 | 3 |
| 24 | Exeter | 6 | 0 - 2 - 4 | 6 | 16 | -10 | 2 |

# Julian framvegis í essinum

**Tá Hull sigurin var tryggjaður, valdi Brian Little føroyska landsliðsmanninum at hvíla seg**

Tað gongur strúkandi hjá Hull og Juliani Johnsson. Hesa ferð var talan um grannadyst á heimavølli ímóti York, sum varð sent til hús við 4–0 tapi.

Hull venjarin hevði framt nógvar broytingar á sínum liði, sjálvt um teir næstseinast eisini vunnu. Men Julian Johnsson varðveitti sítt pláss á sentrala miðvøllinum, og har var hann, inntil tað restaðu tíggju minuttir, og sigurin var fullvísur. Sambært Hull heimasíðuna valdi venjarin tá at taka Julian út fyri at spara hann.

Julian hevði ein góðan møguleika at koma á málskjúttaralistan, tá støðan var 1–0, men skotið úr sjey metrum fór langt við síðuna av.

Hull kom á odda við stútara í 23. minutti. Í 61. minutti øktu teir við brotssparki, og so skoraðu teir aftur í 72. og tí, sum teir siga vera í 95. minutti.

**jh**

# Vunnu uttan Súna

FC Zwolle er eftir fýra umfør á odda í næstbestu hollendsku deildini. Leygardagin vunnu teir 1-0 í heimadystinum móti Heracles, og hevur liðið sostatt framvegis fulla úrtøku fyri dystir sínar. Súni Olsen var ikki á liðnum hjá FC Zwolle.

**-jm**

